# Heystsetan ‘26

## frá 30. sept. til 13. okt.

sólorka



### FRÆNDUR Í SÓLORKU

40-ára haldið hjá vælumtókta klaksvíks-bólkinum hevur premieru í Heystsetuni. Frændur eru annað høvuðsevni okkara á Vaglinum, og teir spæla eisini í Klubbanum



### ØLL EIGA VIT FRAMTÍÐINA

Eingin grund er til at seta seg at bína uttan mun til aldrurin. ‘Eingin er ov gamal til framtíðina’ er spennandi tema við Duritu Holm og Jóhannusi á Rógvu Joensen.



### FESTLIGT KOKKASKEIÐ

í Alicante er ein nýggj útferð í heyst. Harafturat hava vit hópin av øðrum vøkrum og spennandi útferðum og tiltøkum, sum tú kanst tekna teg til



### UNDIRHÚS OG UNDIRHALD

Summar dagar hava menninir sítt egna undirhús, har teir kunnu fortelja skrønur og reypa, sum teimum lystir. Undirhald trýtur ikki til allar gestirnar.



### GISTING & PRÍSIR

Mitt í lítla hugnaliga býnum Albir hava vit 60.000 fermetrar av føroyskum grannalagi. Her kanst tú gista í nýumvældum kømrum ella góðum íbúðum. Sí eisini prís á síðu 6



# Eitt eldorado av hugna og upplivingum

Heystsetan er ein av klassisku setum okkara við hópin av upplivingum í tí góða veðurlagnum.

Umframt at sóla tykkum og annars taka tykkum av løttum, ber um dagin til at gera fimleik, at ganga vakrar túrar og at koma við á eina ella fleiri av vøkru og áhugaverdu útferðum okkara.

Klokkan 18 hittast vit øll at lurta eftir framløgum, samrøðum, undirhaldi og livandi tónleiki og at syngja saman afturvið onkrum góðum úr ókeypis kafé okkara. Á næstu síðu kanst tú lesa um áhugaverdu tekma okkara.

Hvørt kvøld ber til at dansa í Sólorkuklubbanum undir stjørnuklára himmalinum – hesaferð aftur við livandi tónleiki frá føroysku stjørnubólkunum 'Frændum' og 'After Hours' umframt lokalu bólkunum 'Black Glitter' og 'Clandestinos'.
















**Spennandi tema á Vaglinum**

# Eingin er ov gamal til framtíðina

Dreymurin um framtíðina er ein natúrlig drívmegi til lívsdygd okkara – og eingin grund er til, at hon skal hvørva, um enn vit eru vorðin eldri. Tað er høvuðs-boðskapunum í tema okkara. Gestir á Vaglinum verða m.o. antropologurin og rithøvundurin Durita Holm og persónligi ráðgevin Jóhannus á Rógvu Joensen.

Durita er ein sera áhugaverd og fjøltáttað kvinna. Eftir í mong ár at hava sett sær ótald ævintýrkend mál – m.a. sum bert 20 ára gomul at føra bátin Sølku Vølku kring allan knøttin - hevur hon seinni gjørt spennandi ferðir inn móti sálini.

Umframt at vera ein av okkara kendastu bassspælarum er Jóhannus á Rógvu Joensen ein sera royndur persónligur ráðgevi og sonevndur persónligur coach. Hann hevur hjálpt hópinum av ungum sum eldri, einstaklingum sum fyritøkum og bólkum. M.a. býður hann fólki "árar til at rógva inn í framtíðina" og at røkka persónligu málum – og tað kann gerast uttan mun til aldur okkara, sigur hann.



# Flúgva fagrir fuglar - Frændur vitja

Í ár eru 40 ár síðani, at plátan 'Frændur 2' kom út – plátan, sum av álvara slóð navnið á kenda og framúr vælumtóka bólkinum úr Klaksvík fast í føroyska tónleikasøgu. Frændur fara sum vera man at hava stórar 40 ára fagnaðarkonsertir í Varpinum í Klaksvík. Premieran verður tó sjálvandi í Sólorku, tí fagnaðurin byrjar longu undir Heystsetu okkara. Tá fáa vit vitjan av Frændum, sum - umframt at vera við í prátum um bæði tónleikalívið og mangt annað - fara at spæla bæði á Vaglinum og í Klubbanum

Vit fara sjálvandi eisini at skifta orð við Steintór um hansara óteljandi nýskapandi initiativ til stóran frama og gleði fyri børn eins væl og ung og vaksin. Vit fara at fregnast hjá Rana um alt virksemi hansara, tað mesta úti í føroysku náttúruni, og vit fara at tosa við Eyðun um, hvussu tað er at liva av at vera tónleikari í Føroyum. Og so fara vit mestur eisini at fregnast um, hvussu tað ber til, at teir allir hava so stóran alsk og eru so knáir í talvi.

# Frálíkir føroyskir og lokalir bólkar umframt Frændur






After Hours

sólorka




Clandestinos




Black Glitter








# Vakrar og festligar útferðir









# Albir Garden Resort

Mitt í lítla hugnaliga býnum Albir hava vit 50.000 fermetrar av føroyskum grannalagi. Her kanst tú gista í nýumvældum kømrum ella góðum íbúðum. Umframt svimjihyljarnar hava vit okkara egna vatnland, og tú kanst sjálvandi brúka bæði venjingarrúmið og hitarúmið.

Tað er eisini her í tí stóra urtagarðinum, at tú kanst njóta allar løturnar á Vaglinum og í Klubbanum umframt at gera fimleik og aðrar rørslur á Vøllinum

Hiðani tekur tað bert einar 15 minuttir at spáka oman á strondina gjøgnum miðbýin fram við nógvum matstovum, kaféum og krambúðum.







www.albirgardenresort.com



solorka

**Prísur: kr. 17.400,-**
**fyri hvønn, um tvey gista saman**
**(Eyka fyri einakamar: 1.800,-)**

**HEYSTSETAN FEVNIR UM**

- **Beinleiðis flúgving við mati umborð og busskoyring t/r**
- **Gisting í 13 nætur**
- **Fulla pensjón v/drykkjuvørum**
- **Føroyskar vertir, hjálparfólk og lækna**
- **Fimleik, dans og aðra rørslu**
- **Reseptión á Vaglinum við ókeypis kafé og spennandi skrá hvønn dag klokkan 18**
- **Kvøldarhugna og dans við livandi tónleiki**
- **Høvi at tekna teg til nógvar áhugaverdar útferðir fyri lagalig eykagjøld.**

solorka@solorka.com • tlf. 221090